**Blaðnevnd:**
Magnus Gunnarsson
maggi@sosialurin.fo
tlf. 316135/216135
Eirikur Lindenskov
tlf. 316409/216409
eirikur@sosialurin.fo

**Nevnd í Føroya Ellisakførum:**
Formaður:
Ingi Justinussen
tel 318055/217813
ingi@arb.fo
Næstformaður:
John William Old
tel 311725/223243
jwtrukk@kallnet.fo
Skrivari: Rúni Nielsen
tel 216886
Kassam.: Hans J. Nielsen
tel 318385
Johan Beder
tel 288821 ella 444821

**Eykalimir:**
Júst Sivertsen, tel 310736
Helgi Magnusarson

**Kontaktpersónar:**
Norðoyggjar: Manni Waag Høgnesen, tel 456777
Eyturoy: Jóhan Beder, tel 288821 ella 444821
Vágar: Hans Elmar Poulsen tel 332411 ella 332877
Sandoy: Ásmundur Johannesen, tel 310207
Suðuroy: Mogens Petersen tel 371466

**Hølisumsjón:**
Heini á Borg
tel 311960/543061
hab@ssl.fo

**Hølið er opið:**
Mánakvøldið 20[00] til 22[00]
Tel/fax 318099
e-postur:
ellis@post.olivant.fo
Heimasíða:
www.ellisakfar.com
Bústaður: Yviri við Strond 22, 100 Tórshavn

**Framleiðsla:**
Prenttilgerð: Sosialurin
Films- og plátugerð:
SP/F Hestprent
Prent: P/F Prentmiðstøðin
Skorið og heft:
SP/F Hestprent

**Brunnurin:**
Nevndin fyri Brunnin:
Heini á Borg, formaður
tel 543061/311960,
hab@ssl.fo
Brynjolvur Jensen, næstformaður, tel 213727, 314018, bj@trygging.fo
Eirikur Lindenskov, skrivari
tel 216409, 316409,
eirikur@sosialurin.fo
Petur J. Johannessen, kassameistari
tel 243544, 317036,
peturjj@post.olivant.fo
John William Old, nevndarlimur
tel 223243, 311725
jw-trukk@kallnet.fo

Nevndin fyri Brunnin tekur støðu í hvørjum einstøkum føri til fyrispuringar um at hýsa ellisakførum. Sáttmáli verður skrivaður og gjaldsavtala gjørd frammanundan

Næsta blað kemur út í januar. Evstamark fyri tilfari er 30. desember

Upplag: 1.200 eintøk

# At koyra bil tað so stuttligt er…

*– Tit eru bara nakrir stórir smádreingir, sum framvegis vilja sleppa at spæla bil…*

Soleiðis hoyrir tú ofta sagt, tá prátið kemur inn á ellisakfør og okkara ósvitaliga hug og vilja til at pjøssa um gamlar bilar og gamlar motorsúkklur. Og tað er ikki frítt, at ein farri av sannleika er í hesum póstandi. Men tað er ikki allur sannleikin!

Sonne Smith segði tað so rámandi í blað okkara herfyri, tá hann hugleiddi um sína gomlu BSA. Hann segði: »BSA Rocket 1965 Fø 8.829: Eg elski teg!« Hann segði seg vera vorðnan ein »*Easy Rider*« við denti á »*easy*«.

Og tað er júst tað, sum er eyðkennið! Tað er ikki tann drepandi ferðin og harði tónleikurin, sum hevur okkara tokka, men njótilsið av at koyra í einum gomlum bili, sum luktar av metalli, plasti og kanska leðri ella at hoyra vakra ljóðið – eitt nú frá BSA'ini hjá Sonna.

Tað er trupult at definera, hvat er tað »rætta« ellisakfarið. Meiningarnar eru ymsar – tó ofta tengdar at aldrinum. Dreingjaminnið er ofta tað, ið allýsir, hvat í tínum hugaheimi er tað rætta ellisakfarið. Tann bilurin, tú minnist sum smádrongur er títt ellisakfar.

Tíbetur, kunnu vit siga, tí tá soleiðis er vorðið, so fáa vit alla ta føroysku bilasøguna í síni breidd umboðaða í tí, sum limir okkara definera sum ellisakfør, tí limir okkara eru í øllum aldri. Ein tann virknasti er føddur áðrenn fyrsti bilurin kom til Føroya tann 6. mai í 1922.

Sum vit kunnu lesa í hesum blað, so er verulig gongd aftur komin á arbeiðið í brunninum við Gráastein. Nevndin fyri brunnin fekk á aðalfundinum í vár víðari heimildir soleiðis, at hon nú fult og heilt stýrir øllum, sum hevur við brunnin at gera. Tað er eyðsæð eitt av aðalmálinum hjá einum felag sum okkara at útvega hølí, ið kunnu hýsa akførum limanna, og so er endamálið við einum tøkniligum savni eisini avgjørt av okkara áhuga.

Felagið er eisini í ferð við at savna saman tilfar til bók um føroysku bilasøguna. Hetta arbeiðið er komið væl áleiðis, tó at tað stóra skriviarbeiðið er eftir. Men saman við karmunum, sum verða skaptir um endamál okkara við brunninum, so er okkara áhugaarbeiði samstundis ein týðandi varði í siðsøgu føroyinga. Vit kunnu ikki siga, at bilasøgan hevur vakt serligan ans í føroyskari søgusavnan – og er tað tí rættuliga áhugavert, at eitt áhugafelag kann taka stig til slíkt arbeiði – og fremja tað í verki.

Tí er alt ikki tað bera spæl. Men jú – Vit eru stórir smádreingir kortini – og tað vilja vit fegnir framhaldandi vera…

*Eirikur Lindenskov*

# Til Hetlands á framsýning

**Hetlendska systirfelagið hevur boðið okkum til stóru framsýningina, »Shetland Classic Motorshow 2004«, sum verður í juni komandi**

*Ingi Justinussen*

Hetlendska felagið hevur vent sær til Føroya Ellisakfør og bjóðað okkum at luttaka í Shetland Classic Motorshow tann 5. og 6. juni 2004. Hetta er framsýning, teir hava annað hvørt ár. Í 2002 vóru 150 bilar, 150 motorsúkklur og 80 motorar og traktorar sýnd fram. Nógvir av luttakarunum koma av meginlandinum, og komandi ár verður luttøkan væntandi enn størri.

Um nóg stórur áhugi verður, ætla Føroya Ellisakfør at luttaka á framsýningini.

Farið verður tann 4. juni, og vit koma aftur tann 9. juni. Tað er ógjørligt at siga nakað um ferðaseðlakostnaðin longu nú. Hann verður allarhelst tengdur at luttakaratalinum.

Ætlanin er at skipa túrin sum eina pakkaferð við gisting, og sjálvandi fer felagið at arbeiða við at fáa ein so góðan prís sum gjørligt.

Einki krav er til slag og aldur á luttakandi akfari, og sjálvandi ber eisini til at koma við uttan at hava akfar at sýna fram.

Um nakar hevur áhuga fyri tiltakinum, so kunnu tey venda sær til nevndina.

# Okkum tørvar tilfar og myndir frá lesarum

Fyri at gera blað okkara enn meira áhugavert, sóknast vit eftir myndum og tilfari frá lesarum.

Alt hevur áhuga, ið á onkran hátt hevur við endamál okkara at gera. Tað kann vera ein forkunnug mynd av áhugaverdum bili, onkur hending, heima – eins og úti í heimi.

Í nógvum privatum myndasøvnum er hópur av áhugaverdum myndum, og nógv ellisakfør standa kring landið, sum lesarar okkara fegnir høvdu vilja lisið um.

Alt hevur áhuga, tit skulu bara venda tykkum til blaðbólkin – hugskot til okkara eins og lesarabrøv eru kærkomin!

*Eirikur og Maggi*



*Ein Toyota Crown Mark II Coupé sæddur í Gøtudali í november í ár…*



*Ein Volga uttan fyri forsætisráðharraborgina í Ulaam Bataar í Mongolia í apríl 2000*

# Austin 1300 til sølu

Bilurin er keyptur í Vejle í Danmark í 1996. Hevur ikki verið skrásettur síðani. Bakbrúgvin skal skiftast, hon fylgir við og er keypt fyri 2.000 kr. Harumframt er rusthol við hurðapanelið, helst hevur vatn staðið í bilinum.

Bilurin kostaði 8.250 kr. Eg hevði mót upp á renoveringina, men kom ongantíð í gongd. Bilurin kann brúkast, sum hann er, lakkið er gott, kromið er gott, innan er hann ókey, so um tær 2.000 kr fyri bakbrúnna trekkjast frá er heilt vist virði í restini av deilunum, eisini um bilurin ikki skuldi verði gjørdur.

vespa@email.dk



KIA CARNIVAL

Rætti bilurin til mong endamál

Pláss fyri 7 fólkum og hópin av viðføri

- ✓ STØRSTUR Í SÍNI STØDD
- ✓ VIÐ STØRSTA DIESELMOTORI
- ✓ TIL BESTA PRÍSIN
- ✓ 3 ÁRA GARANTI







VØRUVOGNUR
231.800,-

PERSÓNVOGNUR
274.800,-

Automatisk gear +15.000,-

**Nýggjan motor:**
2.9 Common Rail · Turbo-Diesel · 16V 144 HK · 5 hurðar

D. B. Bilar

J BRONCKSGØTA 15 · FO-100 TÓRSHAVN · TEL 310600